# Reglugerð fyri stuðul til viðarvøkstur

## Endamál

**§ 1.** Reglugerðin ásetir treytir fyri nýtslu av konto nr. 18.33.2.05 Træplanting.

*Stk. 2.* Játtanin kann nýtast til stuðul til frama fyri viðarvøkstur fyri at fríðka um lendi, skapa lívd og rekreativ økir, umframt at verja ímóti jarðarmáan.

## Stuðulstreytir

**§ 2.** Stuðul kann veitast kommunum, einstaklingum, feløgum og virkjum.

*Stk. 2.* Stuðul verður bert veittur til verkætlanir, har gróðursetta lendið (t.v.s. tann parturin av einum lendi, ið verður gróðursettur við viðarvøkstri), er størri enn 2.000 m2.

*Stk. 3.* Stuðul skal nýtast til verkætlanir, ið kunnu metast at hava alment gagnligt endamál,

*Stk. 4.* Stuðul sum ikki er nýttur innan 31. desember, fellur burtur. Eftir umbøn kann tilsagnarfreistin í serligum førum verða longd við upp til 4 mánaðir eftir árslok.

*Stk. 5. F*rágreiðing um úrslitið av verkætlanini skal latast Umhvørvismálaráðnum tá verkætlanin er liðug, ella í seinasta lagi 20. februar eftir lokið fíggjarár.

## Serligar verkætlanir

**§ 3.** Tá ið Umhvørvismálaráðið metir tað vera átrokandi, at heilt ávísar verkætlanir verða framdar, kann ráðið seta í verk hesar verkætlanir við fígging útvegað av játtanini til træplanting.

*Stk. 2.* Tá ið Umhvørvismálaráðið setur í verk verkætlanir, kann tað gerast við almennari lýsing í fjølmiðlunum, ella við beinleiðis samskifti við serfrøðingar.

GONGIN 7 • 100 TÓRSHAVN • TELEFON 35 87 00 • E-MAIL: UMHVORVI@UMHVORVI.FO

**Umsókn**

**§ 4.** Fyri 2023 skulu umsóknir um stuðul vera Umhvørvismálaráðnum í hendi til lýstu freist, annars í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári. Lýst verður á heimasíðuni hjá ráðnum www.umhvorvi.fo.

*Stk. 2.*Verður øll játtanin ikki nýtt í fyrsta umfari, verður lýst eftir fleiri umsóknum við nýggjari umsóknarfreist.

*Stk. 3.* Umsóknir skulu skrivast á oyðublaðið "umsóknarblað til stuðul til viðarvøkstur", sum er tøkt á heimasíðu ráðsins. Aðrar viðkomandi upplýsingar fyri umsóknina og verkætlanina kunnu leggjast við sum fylgiskjøl til umsóknarblaðið.

*Stk. 4.* Móttiknar umsóknir verða sendar Umhvørvisstovuni, og, tá ið tað verður mett neyðugt, øðrum viðkomandi pørtum til ummælis, sum millum annað skulu tryggja, at innræsnar (invasivar) plantur ikki verða nýttar.

**Útgjald**

**§ 5.** Stuðulin verður útgoldin tá Umhvørvismálaráðið hevur móttikið verkætlanarroknskap.

*Stk. 2.* Verkætlanarroknskapurin skal lúka treytirnar í §§ 21-22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

**Gildiskoma**

**§ 6.** Henda reglugerð kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer reglugerð til frama fyri viðarvøkstur frá 23. januar 2020 úr gildi.

Umhvørvismálaráðið, 11. apríl 2023

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna

/Pól Egholm
aðalstjóri